Eiðis kommuna

# SKRIVSTOVUFÓLK

**Søkt verður eftir skrivstovufólki at byrja skjótast til ber**

**Høvuðsarbeiðsuppgávur:**
- Planleggja, raðfersta og samskipa arbeiðisuppgávurnar á skrivstovuni
- Tryggja dagligu arbeiðisgongdirnar
- Tryggja eitt gott samskifti við borgarar og viðskiftafólk
- Fyrireika bygdarráðsfundir saman við borgarstjóranum
- Dagføring av heimasíðu
- Aðrar fyrisitingarligar uppgávur

**Førleikakrøv:**
Útbúgving:
- Relevanta útbúgvin innan skrivstovuøkið, fyrisiting ella líknandi førleika

EDV: Kunnleika til m.a. hesi forrit:
- Journalskipan
- Tekstviðgerð
- Rokniark
- Kalendara- og t-postskipan

**Royndir:**
Ynskiligt er at viðkomandi hevur innan fyrisiting og skrivsstovuhald

**Annað:**
Viðkomandi, ið settur verður, hevur tagnarskyldu viðvíkjandi viðurskiftum, ið kunnleiki fæst til gjøgnum starvið, eisini aftaná, at viðkomandi er farin úr starvi.

**Persónligar eginleikar:**
Skal m.a:
- Vera virkisfús/ur og framsøkin
- Síggja trupulleikar sum uppgávur og ikki sum forðingar
- Hava góðar menniskjaligar og fakligar eiginleikar
- Kunnu virka í góðum samstarvi við starvsfelagar og eggja teimum at menna tænastustøðið
- Vera trúgv/ur móti tiknum avgerðum

**Arbeiðstíð:**
Arbeiðstíðin er 30 tímar um vikuna

**Løn:**
Starvið verður lønt samb. sáttmála við avvarðandi yrkisfelag

**Umsóknarfreist:**

Umsóknir v.m. skulu sendast til:

Eiðis Kommuna
Brekkuvegur 22
Att: Borgarstjórin
FO-470 Eiði

Og skulu vera Eiðis kommunu í hendi, í seinasta lagi mánadagin 30 mars. 2009 kl. 16.00

Meiri fæst at vita um starvið við at seta tykkum í samband við Rólant Poulsen, borgarstjóra, á tlf: 213312

**Eiðis kommuna**
Brekkuvegur 22
470 Eiði



SJÓNDEPILIN

# SKRIVSTOVUSTARV
## á Sjóndeplinum

Søkt verður eftr skrivstovufólki at byrja 1. mai 2009. Talan er um eitt ½ tíðarstarv – 20 tímar – við hesi arbeiðstíð:

| | |
|---|---|
| Týsdag: | 09.00 – 15.30 |
| Mikudag: | 09.00 – 15.30 |
| Hósdag: | 09.00 – 16.00 |

Sjóndepilin veitir tænastur til blind og sjónveik um alt landið.

Depilin hevur tríggjar sjálvstøðugar eindir: Ráðgevingin, Dagtilhaldið og Virkishúsið.

Skrivstovustarvið er fyri alt økið.

**Starvið fevnir um:**
- vanligt skrivstovuhald, skrásetingar, journal, postavgreiðslu, telefonavgreiðslu o.t.
- ljóslesing og samskipan av skjølum til Gjaldstovuna
- dagføring av heimasíðuni
- skrivari hjá blindum í arbeiði á deplinum

**Vit vænta, at tú hevur:**
- skrivstovuútbúgving ella aðra viðkomandi útbúgving
- dugir væl at skriva føroyskt
- góðan telduførleika
- góð samstarvsevni og ert fyrikomandi
- evni at arbeiða sjálvstøðugt og ert málsøkin

Starvið er lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Umsókn við avriti av prógvum, CV og møguligum viðmælum skulu vera Sjóndeplinum í hendi seinasta lagi týsdagin 24. mars 2009.

Umsóknir skulu sendast til:
Sjóndepilin
att. leiðarin
Boks 2074
FO-165 Argir

Eru fyrispurningar, kunnu tit venda tykkum til depilin eftir 16. mars á tlf. 318222 og spyrja eftir leiðaranum.

# Aðalfundur

Aðalfundur hjá FRÆLSI, felagið fyri frælsan ítrótt í Vágum, hevur aðalfund, fríggjakvøldið tann 26. mars 2009, kl. 18.

GRINDAMANNAFELAGIÐ
1993 1584

# Aðalfundur

Aðalfundurin verður í Norðurlandahúsinum leygardagin tann 28. mars 2009 kl. 13.30 við hesi skrá:

1. Frágreiðing frá virki felagsins í farna ári
2. Grannskoðaður roknskapur verður lagdur fram
3. Val av einum nevndarlimi
4. Val av grannskoðara
5. Ásetan av limagjaldi
6. Innkomin mál
7. Ymiskt

Gjørt verður vart við, at mál, sum ynskjast viðgjørd sambært pkt. 6, skulu vera nevndini í hendi í seinasta lagi 7 dagar fyri aðalfundin.

Aðalfundurin er almennur.

Høvi er altíð hjá áhugaðum at gerast limir.

**Nevndin fyri Grindamannafelagið**
**Fútalág 40 · 100 Tórshavn**

# TELDUSKEIÐ
## á Háskúlanum



**EMAIL & INTERNET FYRI NÝBYRJARAR**

Skipað verður fyri 3 byrjunarskeiðum:
17. - 19. mars
23. - 25. mars
15. - 17. apríl
Undirvíst verður hvønn dag millum 9.30 og 15.00.
Skeiðkostnaðurin er kr. 900,-
Íroknað er matur og kaffi

Lærari: Elin Lindenskov

**Føroya Fólkaháskúli**
**Háskúlavegur 14 - FO 100 Tórshavn**
**Telefon 311743 - haskulin@haskulin.fo**




Vit seta lýsingina upp fyri teg ókeypis.
**Tel. 34 18 00**
**lysing@sosialurin.fo**